# HEILSANIR



**Góða Ingibjørg**
Hjartaliga tillukku við 10 ára føðingardegnum. Alt tað besta í framtíðini.
**Mamma, babba og Durita**



**Góði Pætur**
Hjartaliga til lukku við 2 ára degnum 14. sept. Jesus pápi signi framtíð tína.
**Kærar heilsur omma, abbi, gubbi, Ingi og fastur**



**Góða fitta Kristina**
Hjartaliga tillukku á 3 ára degnum 17 sept. Vit elska teg! Muss og klemm frá
**Mammu og babba**



**Góða Lilian**
Hjartaliga tillukku við degnum. Alt tað besta til tín.
**Ynskja mamma og babba**



**Góða mamma og omma**
Hjartaliga tillukku við 87 ára degnum. Alt gott í framtíðini.
**Kærar heilsur Jákup, Alma, Bent og Gunnvør**



**Hallów**
Hvør skuldi trúð, at hendan gellan fyllir 50? Altíð klár at renna runt í handlar í Aberdeen. Mangt verður í neyðini nýtt. Hjartaliga tillukku .
**Ynskja D.S. L. M.**



Hesin maðurin sær løgin út. Tað er hann ikki, hann er bert góður við børn og dugur sera væl at liva seg inn í teirra verð. Hevur lært á Tekniska skúla, Exportskúlanum, men er bert á Kósini. Hann fyllur 30 leygardagin. Hann kann gerast hugtungur, sum tað sæst á myndini.



**Góða mamma og vermamma**
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku á 65 ára degnum í morgin. Harrans ríku signing í framtíðini ynskja vit tykkum báðum. Takk fyri alt tit eru fyri okkum.
**Bestur heilsnur børn og svigarbørn**



**Góða omman**
Hjartaliga tillukku á 65 ára degnum í morgin. Eisini ein heilsa til abba. Takk fyri at tit altíð hava tíð til okkum. Vónandi fáa tit nógv góð ár saman. Jesus pápi signi tykum. Vit elska tykkum.
**Ynskja ommu- og abbabørnini**



**Góði elskaði Bárður**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum 15. sept. Jesus pápi fylgi tær.
**Ynskja babba og mamma**

# TILTØK

**Felagið Tórshavn – gongutúrur**
Sunnudagin 18. september verður ein gongutúrur uppá Reynsatindar í Sandavági. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Túrurin er miðal, bratt í støðum. Gingið verður uml. 4 tímar, minst til at hava góð og heit gonguklæðir og ein matpakka við. Tilmelding neyðug.

**Tilhaldin Hugnin í Sandoynni**
Er opið mánadag og mikudag kl. 14.00 til 17.00. Drekkamunur er at fáa báðar dagarnar eins og bløðini eru til taks. Øll eru vælkomin.
Mánadagin 19. september Hoyra søgu.
Mikudagin 21. september Spæla ymisk spøl.

**Dagtilhaldið í Luffistovu, Fuglafjørður**
Vit byrja aftur týsdagin 13. september. Opið er týsdag, mikudag og hósdag frá kl. 15.00-18.00.

**Dagtilhaldið Fløvi**
Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum. Tlf. 448279. Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið er mánadag til fríggjadag kl. 15 – 18.
***Mánadagin 19. september***
Fimleikur
***Týsdagin 20. september***
Prát og sangur. Vit spæla landastrok.
***Mikudagin 21. september***
Boccia
***Hósdagin 22. september***
Pappír útskering v/ Hjalmar Olsen.
***Fríggjadagin 23. september***
B***yrjandi enskt***
***v/ Annette Gaardlykke.***

*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Tú ert vælkomin at hava títt egna hondarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Frits Jacobsen, tlf. 332053 ella ein av nevndarlimunum.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

**Spælistovan í Margarinufabrikkini**
Opið er mánadag, týsdag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri børnum/foreldrum uttan ansing.